# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um vinmannin Inga Mohr



Síðani komu boðini, at Ingi ikki var her millum okkum longur. Hettar hendi aftaná, at hann var vorðin so álvarsliga sjúkur. Vit hava báðir kent hvønn annan, síðani vit slitu okkara barndómsskógvar her á havnargøtum.

Ingi var tann, ið tordi alt og segði alt uttan at leggja fingrarnar ímillum! Hann hevði ein harðan tóna í almenna politiska kjakinum. Óansæð harða tónan, var hann samstundis eitt elskandi menniskja. Ingi elskaði familju sína, tónleik, og ikki minst var Ingi djóravinur. Stutt sagt elskaði Ingi alt tað vakra í lívinum. Hann var við øðrum orðum harður, bleytur og klókur samstundis, og dugdi hann so sera væl at balansera millum hesar ymsu persónligheitirnar í øllum lívsins viðurskiftum.

Um tú hevði ein trupulleika av einum ella øðrum slagi, og fortaldi Inga hettar, kundi hann virka at standa í øðrum hugaheimi og koma við einari viðmerking um, at nú hevði hann tømt súrhoyggjabrunnin, ella júst var vorðin liðugur at sláa trøðna. Man fekk varhugan av, at tað sagda slettis ikki var sivað inn, tá ið hann kom við slíkum viðmerkingum. Men Ingi lurtaði altíð! Tveir dagar seinni ringdi hann og kom við loysnini á trupulleikunum. Ingi koplaði altíð heilan til og tonkti seg væl um, áðrenn hann valdi síni orð. Soleiðis var Ingi!

Tá ið vit báðir vóru yngri, skikkaðu vit okkum ikki altíð sum Guðs bestu børn. Vit høvdu tað stuttligt og spennandi – kanska stuttligari enn vit burdu. Ingi kom so seinni til ta niðurstøðu, at hesin hátturin at føra lívið mátti halda uppat. Hann ásannaði, at lívið hevði onnur, ríkari og betri virðir. Síðani hettar val, skikkaði Ingi sær so frætt, sum nú einaferð til bar.

Tá ið Ingi náddi hesa niðurstøðu, tók eg í fyrstu syfti eitt sindur av frástøðu frá honum. Eg helt, at hann var vorðin keðiligur! Men enn einaferð hevði Ingi rætt og hjálpti mær við at geva mær sjálvum ta bestu gávuna. Hann vísti mær, at eitt lív uttan rúsdrekka kundi lata seg gera, og eg fór somu leið sum hann og fekk tað fantastiska lív, ið eg havi í dag.

Ikki var eg tann einasti, ið Ingi fekk at velja hansara lívsleið. Ingi fekk so mong onnur eisini at ganga somu leið sum hann. Hann opnaði eyguni fyri teimum "blindu" og vísti teimum tað vakra, ið lívið hevur at bjóða uppá.

Hesa síðstu tíðina var eg og vitjaði Inga nakrar ferðir, nú hann var vorðin so álvarsliga sjúkur. Tað píndi meg at síggja ein so sterkan og fantastiskan vinmann støðugt gerast veikari fyri hvørja ferð, eg vitjaði hann.

Tá ið eg næstseinasta sunnudag uttanfyri húsini hjá Inga og Annu saman við Gunnari, abbadóttrini og nøkrum vinfólkum í góðveðrinum 60 ára føðingardagur sat, hevði eg ilt við at skilja, hvat Ingi segði. Hann var minkaður burtur í einki av hesi álvarsliga ljótu sjúku. Hettar fekk meg at hugsa við mær sjálvum, at hettar allarhelst var seinastu ferð, at eg sá Inga. Og so gekk sjón fyri søgn...

Sunnudagin varð eg uppringdur av einum vinmanni, ið fortaldi mær sorgarboðini.

Tankarnir hjá mær um, at Ingi og eg ongantíð aftur skulu sita saman, fortelja hvørjum øðrum stuttligar søgur, flenna, lurta eftir góðum tónleiki, og hoyra hansara fantastisku tónleikaevni førd út í lívið, tá ið hann boksaði við klaverinum í stovuni, virka mær ófatiliga fjarðir.

Men ein partur av lívinum er at doyggja, men sum eg segði við Inga, er hann alt ov livandi til at doyggja. Í mínari verð er Ingi ikki egnaður at vera deyður.

Eg havi bert góð minnir um Inga, og tankarnir fara til tín Anna, sum hevur verið ein fantastiska góð kona og til tykkum øll børn sum abbabørn, øll tykkum, sum Ingi elskaði yvir alt á jørð.

Hvíl í friði!

**Vinmaður tín Rasmus**

†

Kunngjørt verður, at okkara høgt elskaði

**Ingi R. Mohr**
Tórshavn

andaðist á Bispebjerg hospital
sunnudagin 5. juli 2009, 66 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer
leygardagin 11. juli kl. 14.00.

**Anna**
**Unn, Gunnar, Guðrið og Brynhild**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu,
tá okkara kæra systir

**Elisabeth Maria Niclasen**
(vanliga nevnd Betta )

andaðist og var jarðað.
Ein serlig tøkk til starvsfólkið á
Suðuroyar Ellis- & Røktarheimi.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til
Suðuroyar Ellis - & Røktarheim.
Hjartans tøkk øll, ið hjálptu til á ymiskan hátt í
sambandi við jarðarferðina.

*Familjunnar vegna*
**Jessie, George og Martha**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og
hjálpsemi, tá kæra mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Kittan Poulsen**
Fuglafirði

andaðist og varð jarðað.
Takk fyri góð orð í kapellinum og í kirkjuni.
Takk fyri gávur til kirkjuna.
Takk til hornorkestrið og tykkum, ið fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jørleif, Sonja, Jónsvein og Jógvan Finnur**

## Bussleiðin 30 ár




*Bussleiðin í Tórshavnar kommunu hevur nú virkað í 30 ár. Her er ein av fyrstu bussunum í Steinatúni*

Í gjár vóru júst 30 ár liðin síðan Bussleiðin í Havn byrjaði við trimum nýggjum Volvo býbussum.

Tað var tann 8. juli 1979 at tann regluliga koyringin hjá Bussleiðini í Havn byrjaði.

Tórshavnar býráð keypti tríggjar Volvo VBK bussar til endamálið, og P/F Bil rak hesar bussar fyri býráðið tey fyrstu árini. Táverandi býarverkfrøðingurin, Vøgg Guttesen, hevði ábyrgd av bussleiðini.

Í 1983 bleiv Bussleiðin umskipað soleiðis, at fýra busseigarar áttu og róku hvør sínar tveir býbussar, teir vóru: Arni Berg, Gunleif Danielsen, Sámal Bláhamar og Mourits Mouritsen. Allir høvdu teir sáttmála við býráðið.

Síðan 1. februar 2003 hevur Mourits Mouritsen átt og rikið allar býbussarnar í Havn fyri Tórshavnar kommunu, og Gundur Johannesen í Kollafirði hevur rikið Bussleiðina millum Havnina og Kollafjørð síðan januar 2001.

Finnur Johansen, sum var býráðslimur frá 1972-84 og formaður í Mentamálanevndini hjá Tórshavnar býráð, sigur, at áðrenn fyrstu bussarnir, sum vórðu uppbygdir í Norra, komu til Føroya, skuldu teir finna ein lit, og nýggja leiðin skuldi hava eitt navn. Tað vóru fleiri uppskot uppi at venda, t.d hevði Magnus Gregoriussen í Havn nevnt við Finn um navnið Bussleiðin.

Finnur sigur, at avgjørt varð, at bussarnir skuldu vera reyðir við ljósum taki og endaliga navnið skuldi verða Bussleiðin.

**mg**

### Dagurin

**9. juli. Sostrata.** Hetta grikska kvinnunavnið er einki kent halgimennisnavn. Dagurin hevur borið ymisk onnur nøvn, men frá árinum 1726 kemur navnið Sostrata í álmanakkarnar.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta - útgáva 2008)*

### 60 ára føðingardagur

Sunnudagin 12. juli verður Eivind av Reyni í Havn 60 ár. Dagurin verður hildin í nýggju hølunum á Reyni Service í Hoyvík 12. juli frá kl 12.00 til 17.00. Øll eru vælkomin.